gult cyan magenta svart



# Sól og summar á Gøtusandi

*Í góðveðrinum, leygardagin 24. juni, skipaði Gøtu Mennignarfelag fyri árliga summartiltakinum á sandinum í Syðrugøtu. Hetta tiltak gjørdist av sonnum ein ógloymandi summarløta – bæði fyri stór og smá*



*10 spentir fjallarennarar til reiðar at leggja á tað 516 m. høga Støðlafjall, ið sæst aftanfyri*

Leygardagin 24. var árliga summartiltakið hjá Gøtu Menningarfelag við undirheitinum – hugnaløta fyri stór og smá – á sandinum í Syðrugøtu. Í góða summarveðrinum hendan dagin høvdu fleiri hundrað fólk leitað sær oman á sandin at fylgja við og taka lut í teimum mongu tiltøkunum, ið vóru á skránni. Skráin var long og vardi allan dagin. Byrjað varð longu kl. 2 seinnapartin og ikki varð helmað í fyrr enn klokkuni leið væl móti 10 á kvøldið.

Lagt varð fyri við barnaríðing og mong vóru tey smáu, sum hendan dagin fingu sær ein ríðitúr. Løgið sum ross og smábørn ganga upp í eina størri eind!

### Fjallarenning og framsýning

Kl. hálvgum 4 vóru tvey tiltøk samstundis. Tá byrjaði bæði fjallarenningin og framsýningin av sløkkiliðspoliti- og sjúkrabilum, og ikki kann sigast annað, enn at tað vóru glómur í andlitinum á mongum, tá allur riðilin av akførum í fullum útkalli kom av Nesinum og heim á sandin. Blíðir sløkkiliðsmenn, politistar og portørar bjóðaðu øllum – yngri sum eldri – at síggja akførini og børnini sluppu eisini biltúr og at royna ta ymsu útgerðina. Hetta mundi vera fyrsti túrur hjá teimum flestu í slíkum akførum, og helst ein ógloymandi uppliving hjá mongum.

Fjallarenningin, ið nú er vorðin fastur táttur á skránni, varð á fyrsta sinni roynd seinasta ár við góðum úrsliti. Luttakarar komu ymsastaðni frá úr øllum landinum og í ár vóru teir enn fleiri enn seinasta ár. Nevnast kann, at í ár vóru fyri fyrstu ferð eisini kvinnur við og øll fullførdu teinin.

Kappast verður um at renna/ganga upp á tað 516 metra høga Støðlafjall og omanaftur. Runnið verður av Gøtueiði, niðan á Støðlafjall og oman á Gøtusand, har málstrikan er. Spenningurin, um hvør varð fyrstu um málstrikuna, var sum vera man, óførur. Úrslitið av fjallarenningini gjørdist hetta:

Nr. 1 Regin Zachariasen úr Vestmanna við tíðini 33.20.08.

Nr. 2 Jóan Petur G. Olsen úr Norðragøtu við tíðini 34.50.43.

Nr. 3 Marius Jacobsen úr Leirvík við tíðini 35.15.25.

Ognarsteyp vóru latin til nr. 1, 2 og 3, og eisini fekk vinnarin eitt stórt og vakurt ferðasteyp. Nevnast kann, at tíðirnar í ár vóru munandi betur enn í fjør, men tá vóru eisini verri lýkindir at renna.

### Togtogan og annað skemt

Við hálvgum 5 tíðina var togtogan millum Syðrugøtu og Norðragøtu á skránni. Býtt var upp í tríggjar bólkar, ung, konur og menn. Tey ungu úr Norðragøtu vunnu, meðan syðrugøtukonur vóru, sum so mangan áður, tær stinnaru og hjá monnunum drógu norðragøtumenn tað longra stráið. Eisini her vóru ferðasteyp handað vinnarunum. Nú var køkuuppboðssøla o.a. skemt á skránni.

### Kórsangur og røða

Felagskórið Gøta/Leirvík hevur í mong ár ríkað løtuna á sandinum og í ár var onki undantak. Kórið sang nakrar summar- og fosturlandssangir, og sera hugnalig var hendan løtan við sjóvarmálan á Gøtusandi eisini.

Fastur táttur á skránni er eisini røða og í ár var tað Tórbjørn Jacobsen, skipari, á Glyvrum, ið helt røðu. Tórbjørn er kendur røðari og er hálvur gøtumaður og staðkendur, sum tað eisini skilst av røðuni, ið er prentað niðanfyri.

Eftir røðu og kórsang varð kynt í tað stóra bálið á sandinum og meðan bálið brendi og hitaði sandin ljómaði felagssangurin av Hellisenda og norður í Barnarættina.

### Sámal og Ronni

Síðsti táttur á skránni á sandinum va rkonsert við Sámali Ravnsfjall og Ronni Nielsen. Hesir báðir, ið teljast millum okkara frægastu vísusangarar og -tónleikarar, sungu og spældu í knappar tveir tímar meira og minni vælkendar vísur og settu eirr flott punktum fyri einum sera góðum og væleydnaðum summartiltaki á Gøtusandi.

### Hjálp frá bygdarfólki og øðrum

Fyri at sovorðin tiltøk kunnu lata seg gera, er neyðugt við góðari hjálp frá bygdarfólkinum og hendan dagin rætti ein stóru rpartur av fólkinum felagnum eina hjálpandi hon, og tað eiga tey stóra tøkk fyri.

Onnur, ið stuðlaðu vóru: Føroya Shell, Faxe Kondi, MBM, HT-transport, P/F Varðin og El-talvuvirkið.

# Tróndur eigur einki vald — enn!

Gøtu Menningarfelag skipaði fyri Jóansvøkuhaldi á sandinum í Syðrugøtu seinasta leygardag. Stórt bál varð kynt á sandinum og ímillum mangt annað sum hendi hendan dagin sang lokala kórið hjá Heðini Kambsdal, vakrar fosturlandssangir, fyri mannamúgvuni og í einum støðgi í sanginum helt Tórbjørn Jacobsen av Glyvrum niðanfyristandandi røðu fyri gøtufólki, harið hann hugleiddi um gamlar dagar í bygdini, um hennara støðu í dagsins Føroyum og tað vegamótið sum føroyingar nú standa við politiskt.

Tað var ikki Bob Dylan sum fann útav tí, at tíðirnar broytast, hann staðfesti tað bara í sanginum The Times they are a´changing, harið hann m.a. ávarðaði status quo- politikkararnar um at ansa sær, skuldu múrarnir ikki bólta omanyvir teir, tá ið brimið frá ungdómsillveðrinum í 60-árunum kom skolandi inn yvir bæði heiðið og kristið.

Hvørt einstakt menniskja er bara eitt blunk, ein lítil ljósglæma, í stóra tíðarhavinum. Kanska hava vit, sum nú eru til sjónar, upplivað størri broytingar, enn ættarliðini undan okkum, og kunna tí við egnum eygum staðfesta, at onki stendur í stað, at alt er í áhaldandi broyting. Alt uttan promenadan her niðri við sjóvarmálan í Syðrugøtu. Líka av Rætt og norð til Húsar, ella heilt norður á Fiskamjøl, er einasta broytingin frá mínum uppvøkstri, at múrarnir á 98 eru rapaðir og gróthúsið hjá Pól Kristoffuri í Guttastovu, ið varð ruddað, og nýtt sum ífylla, tá ið grundarlagið undir hesi nýggju, og nú næstan heimskendu kirkjuni, var lagt. Tað er sum sálarlig, heldur enn sum kosmetisk ífylla, at tað er neyðugt at endurreisa múrarnar á 98. So misháttur ið hesin hjallurin hjá hinum kenda Martinusi í Inniguttastovu, og síðani hjá Pól Andreasi, annars kundi tykjast, so var hann onkursvegna eitt varðtekin, kjølfestan í hugaheiminum hjá øllum teimum, ið vara av hesi bygdini. Ingi Joensen, fotografur, sum tók hina kendu myndina, út eftir víkini, sigur seg ongantíð, at hava verið so bombarderaðan við umbønum, sum frá gøtufólki, serliga útisetunum, sum vilja hava hendur á hesum sjaldsama bílæti. Kanska onkur kundi brúkt hetta temaið í valkampinum til bygdarráðið í heyst. Havi tosað við formannin í forstandaraskapinum um hetta, men har hendi onki. Hann er kanska ikki so nostalgiskur av lyndi sum vit aðrir.

Flestu promenadur í heiminum hava hendan sama trupuleikan. Mynstrið læsir seg fast niðri við sjóvarmálan, og til endans verður alt til klenodiir, sum ongin vil skala ella broyta. Og síðani koma friðingarmyndugleikarnir uppí og konservera tað sum stendur. Heimsins kendasti sjóvarmáli er kanska í Havanna, harið teir hava hina víðagitnu Malecon-promenaduna, ið yður av lívi. Undirhúsið hjá teimum eldru, slaraffenlandið hjá gøtumusikarum og staðið, harið eyguni á fyrsta sinni møtast og tey ungu oftani leggja ástir saman, og hóast støddarmunurin er stórur, so er hon ikki so heilt ólík hesari. Myndin hevur læst seg fæsta. Brimgangurin er hin sami. Hon er friðað, og verður latin framtíðini sum ein ímynd um tað sum einaferð var.

Men aftanfyri gongufólkið & múrarnar herja dynamiskir vindar. Og tað er ikki ov nógv sagt, at í Gøtu hevur barometrið fyri tað nógva staðið á stormi, tá ið um framtøk og broytingar ræður. Kanska hevur login í skeggjaæðrunum ein serligan intensitet. Tað er í hvussu er ikki av tilvild, at hendan bygdin, og tá hugsi eg um allar 4 bygdirnar, hevur otað seg uppí oddin av føroyskum framtakshugi. Av sonnum ein vinnuligur bulldozari. Tað ræður um ongantíð at liggja á boðunum, hetta man vera lívsjáttandi kredan, sum hevur skapað hesa legendarisku uppdriftuna, ið gøtumenn eru so kendir fyri, eisini í øðrum samanhangi. Teir hava sannað tað sama sum skiparin úr Hvannasundi segði: "Tú kanst leggja alt arbeiði í Harrans hendur, men treyðugt eigur tú at biðja hann gera tað fyri teg. Harrin kemur ikki uppí koyggjuna til tín, um ella táið tú er lagstur uppí hana av leti."

### Við Trónda varð frælsið vegi

Fáar bygdir eiga eina søgu sum hendan. Og sum skálvíkingurin segði, tað man ikki vera av tilvild, at hon fekk hetta einfalda navnið. Flogvitið Tróndur mundi síggja fyrimunirnar. Tí flutti hann ikki hiðani. Sá gøturnar norður- & vestureftir til landsins bestu skipahavnir, ímeðan hann sjálvur sat væl vardur inni á Víkini, við góðum útsýni og brimgangi. Fríða fjallameingi og stóru akrarnar. So høgt til loftið og so vítt til veggja. Hetta skuldi verða metropolurin harið fólkið skuldi leggja gøtuna, at vinna sær vísdóm, bæði í stjórnarmálum og átrúnaði. Her skuldi brótast upp úr nýggjum bæði handaliga og andaliga. Ikki undarligt at hann ikki vildi geva seg undir Noregis veldi. At hann ikki væntaði, at alt tað góða skuldi koma frá fremmandum. Sitandi í hesi vælsignaðu perlu, kundi hann illani vænta annað, enn at føroyingar fóru at verða sær sjálvum


*Tórbjørn Jacobsen helt røðu á Gøtusandi*

næstir, vildu fylgja honum og ikki hinum norska stráðmanninum, Sigmundi Brestissyni.

Við Trónda varð frælsið vegi. Tá ið deyðir vóru skeggjar oyggja, orkaði hann ikki meira. Elitutropparnir vóru falnir. Og hansara egna hár var somikið gránað, ryggurin so illani bogin, at høvdingakroppur hansara vann ikki á hevndarhuganum. Tá var lítið annað at gerða, enn at leggja seg í skemmuna, draga hurðarnar fyri og síðani at bíða deyðanum. Eitt intermezzo ímillum lívið og ævinleikan útspældi seg har í koyggjuni. Hann hoyrdi íðurnar róta, hoyrdi deyða manna mál, sá Gøtuboðar bróta og sá reyða hevndarbál. Síðani slóknaði ímyndin um frælsið í Føroyum. Og úr hesum rann ein psykosa, sum illani gongst at sleppa burturúr. Vit hava ov oftani verið okkara verstu fíggindar, okkara argastu mótstøðumenn.

### Guðloysisstemplið hitt snilda vápnið

Gjørda myndin av hinum ónda Trónda, er skapað tá ið imperialistarnir ongi onnur ráðini vistu sær. Stoltleikin og kærleiki hansara til hesar oyggjar forðaði honum í at gerast hentur idiotur hjá maktgreðingunum, ið stjórnaðu tátíðarinnar stórvalda- & hjálandapolitikki. Snildasta vápnið var guðloysisstemplið sum sett varð á hann. Tað rímar illani við einasta kenda sálmin úr hansara hondum. Hann trúði á Mariu Moy og eisini á, at givnir vóru einglar góðir. Hetta var ikki av hugarøsing. Hitt annars so fleksibla sinni gav eisini rúm fyri gomlu norrønu guðunum. Í virðing fyri søgunnar gongd. Har var vítt til veggja og høgt til loftið.

Nógv er broytt síðani, - heldur til tað verra. Nú frættist at gøtumenn illani fáa gingið í sama halgidómi. Orsøkin er fremmandur kirkjuovasti, ið hevur biðið fyri tveimum monnum, ið fyri tey heterosexuellu hava tann merkiliga kynsliga hugin, at fara til songar saman. Og at búleika saman. Avgerðin má verða teirra, og hvatið hendir teimum á ævigu veiðuakrunum, tað viðkemur ikki trongskygdum mannabørnum, at taka støðu til. Tað má verða upp til hin alvalda. Tað kann ikki skaða teirra lagnu, at biði verður fyri teimum.



Kanska var lesturin títtari enn kirkjugongdin. Kirkjan lá so langt burturi. Gamli baptistasalurin lá nærri. Og átøkur einum bíbilskum figuri, stjórnaði okkara góði granni, Godtfred Thomsen, einum sunnudagsskúla sum eg bara minnist gott afturá. Minnist meg ikki at hava hoyrt orð grett um, at nakað skeivt var í hesum, at hoyra til kirkjuna og samstundis at ganga í sunnudagsskúlanum, sum einaferð stóð har norðuri á Nesi, omanfyri Fiskamjøl. Og søgan úr Dungahúsunum, her omanfyri, boðar frá sama kodeksi. Evensen próstur gisti altíð hjá Onnu Kristinu og Petur Jacob. Tað vórðu tey ið uppfostraðu hina livandi legenduna, Ludda á Dunganum. Og Evensen var ikki hvør sum helst, prestarnir høvdu tá eitt status, sum lá onkustaðni ímillum drottin og menniskja, og tí mátti alt verða so serliga væl uppleinað, tá ið hann kom á gátt.

### Evensen & Sloan hittast á Dunganum

Tey gomlu har í húsinum høvdu eitt torveyga, harið torvið var serliga gott. Og tað mátti goymast. Skuldi ikki leggjast í bíleggaraovnin fyrrenn prestur kom. Gamli Sloan var eisini vanur at gista har. Og tað einu ferðina komu teir báðir í senn á vitjan. Tá vistu tey gomlu húsfólkini ikki hvatið var til ráða at taka. Har var bara **ein** song til hesar báðar hátíðarligu gestir. Ivasemið og kanska eitt sindur av ráðaloysi á Dunganum. Evensen loysti knútin. Avdramatiseraði problematikkin. Bað tey gerða sum tey vóru von. Leggja sama torv í bíleggaraovnin, seta sama matin á borðið og síðani at lata teir báðar William liggja í somu song. Einasta treytin frá hansara síðu varð, at Sloan skuldi halda sína sertrúgv fyri seg sjálvan, ímeðan teir lógu í seingini. Og so var gjørt. Og morgunin eftir komu teir báðir framaftur, líka óskalaðir sum teir løgdust, og hildu síðani áfram við hvør sínum andaliga virksemi. Minnist hetta sama hjá abba mínum úti á Glyvrum, harið Kristian Osvald Viderø & Eliesar Poulsen plagdu at gista. Tað ber til at liva saman við ymiskum hugsanum, eisini á hesum øki. Tí harmaði tað, at forsíðurnar á landsbløðunum skúmaðu eitt religiónskríggj upp í Gøtu. Eitt Jihad sum ongastaðni hoyrir heima. Her má onkur boyggja seg. Fólkakirkjan má framhaldandi verða hin stóra traktin, sum tekur ímóti øllum, - eingin undantikin.

Tað frættist lítið úr Gøtu eftir deyða Tróndar, og nógv ár fram. Eftir sóttina svørtu og fram ígjøgnum trúbótina er mestsum tøgn. Bygdirnar hava ivaleyst verið fámentar. Stríðið fyri uppihaldinum hevur tikið alla orkuna, har hevur ongin yvirskotsmáttur verið til andaligt høvuðbrýggj. Ein gøtumaður ið hevði silgt úti, hetta var í átjandu øld, hevði vitjað í heilaga landinum. Tá ið hann kom aftur til landa, spurdi bygdafólkið, hvussu hann hevði borið seg at, við at koma niður aftur til jarðar. Hetta sigur kanska nakað um ringa standin.

### Gøta og hennara rolla í tjóðskaparstríðnum

Men sum so mangastaðni festi tjóðskaparrørslan eld í. Eisini her. Gøtan hjá Tróndi varð uppafturgrivin. Annað ljós varð varpað á hann. Fólkið kom higar á fund. Tiltiknir eru fólkafundirnir á Gøtueiði, harið nýyrktir sangir vóru sungnir. Landið sum fyrr ikki hevði verið fyri meiri at rokna enn eitt veiðilendi, var bráðliga vorið móðurlandi sum sungið varð um - og tosað. Sum sagt verður í sálminum, - móðurin, ið enntá, breiðir blik á barnið sítt, tá ið tað umsíður legst í mold.

Vinnan tekur dyk á seg. Nýggjar leiðir verða gingnar. Skip og virkir grógva upp úr lógvunum á vanligum monnum. Sporstreingjarar við øðiligum áræði skipa fyri. Og sjálvandi hevði hetta avleiðingar. Men stríðsmálini gjørdust ongantíð til viðvarðandi ósemjur, sum oyðiløgdu yvirskipaða homogenitetin hjá gøtumonnum. Og vøggan hjá hinum stolta Fiskimannafelagnum stóð eisini her.


*Nógv vóru um boðið at sleppa at sita á rossabaki*

Kunoyingurin, Símun Pauli, hitt stóra andsmennið, andaligi strugglarin, varð oddviti har og ein av frontsoldátunum í tjóðskaparstríði føroyinga. Tá ið hann bað um at síggja akturnar í Louis Zachariassen-sakini, bleiv hann eitt slag av persona non grata hjá danska yvirvaldinum, tí sum tað stendur í Tingakrossi hin 15. September 1915: "____.Det eneste der kom ud af denne henvendelse var, at Kunoy året efter blev fritaget for sine pligter til at spille paa Orgelharmoniet i Gøte Kirke, samt til om forlanges, at udføre Degnetjeneste i samme Kirke." Omma mín, úti í Grógv, plagdi at siga mær frá, at Gamli-Lærari sum Kunoy varð kallaður, gekk hús úr húsi, og bað um undirskriftir, fyri at fáa foreldranna samtykkið um, at hann kundi læra børnini føroyskt. Frálæran var á trappusteininum við Gamla Skúla, - tá ið hetta ikki kundi gerast inni í danska skúlanum, sum tá ráddi og hevði alt vald í Føroyum.

### Alt spektrið hevur flutt seg rætta vegin

Hetta vóru Føroyar fyri lítið meiri enn 90 árum síðani. Og síðani hevur tað, fyri tað nógva, gingið framá. Í Føroyum og í Gøtu. Ikki av donskum trælapengum, men av egnari megi. Tjóðskaparstríðið hevur kvinka allar politiskar flokkar, alt spektrið, hin rætta vegin. Allir vilja standa á egnum beinum, - eisini politiskt. Føroyingar standa á einum vegamóti, harið avgerðir skula fella, antin hendanvegin ella handanvegin. Alt annað enn eitt framtak verður eitt antiklimaks, sum eingin kann liva við. Líggjas Bóndi niðri við Hús, skrivaði í bløðunum fyri seinra heimskríggj soleiðis: "Mót øllum hesum órætti er tað, at føroyingar nú taka seg saman til at vinna aftur tann rætt sum eitt og hvørt frítt og frælst fólk eigur; rættin til at liva í egnum landi sum føroyingar, og rættin til at standa í sambandi við onnur fólk enn tað danska."

Og líta vit at framburðinum við teimum røttu brillunum, varnast vit dynamisku krefturnar, sum hava skapt hetta samfelagið, so skal man vera óluksáliga blindur, skal man ikki síggja møguleikarnar í einum stjálvstøðugum Føroyum. Bara hetta orðaskiftið frá vinnuráðstevnuni úr høvuðsstaðnum, - nú um dagarnar. Ljósár framman fyri tað vit vóru von við. Men ganga rættir. Óttast ikki avbjóðingarnar uttan úr heimi, - meiri enn neyðugt. Óttast ikki tíðarbundnan uppgang. Analysera og handla. Gløggir framherjar, ið gera vánirnar somikið størri, um eitt gott land at liva í, eisini eftir at skeytið til tær føroysku ognirnar er komið heimaftur. Og gøtumenn eru sum altíð fremstir við hermóti, og vinmaðurin, sum eg annars havi arvað frá Pól, morbróðuri, Martin í Grund, hann vaks upp heruppi, í trunkanum, ímillum Guttastovu, Dungan & fyri oman Oyrina, sigur seg at vita hví:

*Hygg út yvir víkina,*
*báran tykist sløtt,*
*Men tá brimið dunar*
*har, tá er aldan brøtt.*
*Skoða so í brimgangin*
*og styrk har tína sál,*
*Her fæst kraft og áræði*
*til at vinna mál.*

Eitt dømið um framburðin sóu vit ígjár. Svínoyggin er globaliserað. Um Gøta ikki er tað, so verður hon tað ivaleyst í næstu framtíð. Dagin fyri at hann gekk burtur fyri Borðoyarnesi, við "Samognini", saman við bróðurinum Dánjali og Peturi í Inniguttastovu, hin 13. Februar 1944, sendi langabbi í Guttastovu eitt hjúnabandsfjarrit norður til Gjáar. Soljóðandi. Til Pól Johannes og brúður hans, og systir Pól Jóhannes við brúðgómi hennara, ynskja vit ein lukkuligan og væleyðnaðan brúðleypsdag og av Harranum eina eyðnuríka framtíð! — Nú sita tit glað við brúðleypsfest, og ikki fingu tit Pól Kristoffur í dag til gest, men aftur í heyst, tá tit einki vara, kunna tit rokna við at síggja ein stóran Gøtuskara. Undirskrivað Jóhanna og Pól Kristoffur. Maðurin átti tann fyrsta bilin í oynni og hevði ídag valla brúkt meiri enn ein góðan tíma norður haðar. Fyri 30 árum síðani mátti Oddfríður ígjøgnum støðina hjá Miu fyri at fáa fatur á Ólavi, morbróðuri. Nú sita synir hansara yviri á Fiskavirkinum og samskifta støðugt & beinleiðis við allan heimin. Øgiligar rembingar. Og tað ræður um at fylgja við, - at liggja á takinum.

### Collins & Ginola til GÍ?

Eisini í ítróttinum. Ímorgin fara gøtumenn aftur á vøllin. Vónandi gongur tað betri enn seinasta sunnudag. Varð so argur av misnýttu møguleikunum, at eg illani fekk koyrt útaftur eftir síðu. Tíbetur møtti eg Atla hjá Odda á einum fólkafundi úti í Heiðunum, og hann royndi at sissa meg, og tá fekk eg spakuliga tamarhald á mær sjálvum aftur. Mest av tí, at eg veit, at hann er væl snarsintari enn hvatið eg eri. Nú hoyrist at stadionspeakarin, Jørgen Evald Solmunde, hevur ætlanir um at keypa miðvallargeneralin John Collins frá Everton og David Ginola frá Tottenham, um GÍ ikki vinnur á B36 ímorgin. Einasti trupulleikin er fínansieringin. Junglutrummurnar vilja tó verða við, at Dunga Jákup og aðrir góðir menn eru komnir uppí leikin. So, nú fáa vit at síggja hvussu leikur fer.

Til endans fer ein gamal gróðarmaður at ynskja tykkum eina framhaldandi góða jóansvøku. Hendan heiðna miðsummarfestin harið trøllkonur vóru brendar á báli. Seinri hildin sum føðingardagur hjá Jóhannusi Doypara. Og nú sum ein góð sosial samvera ímillum bygdafólkið, - sum eitt nú her í Gøtu. Hvussu alt fer at eyðnast, ja, tað er upp til ein og hvønn sjálvan. Sum Edvard Kardelj segði á sinni, næsti maður Tito, og fyrsti kommunisturin ið hevði dirvið til, at kalla hin reyða zarin, Jósup Stalin, fyri ein imperialist: "Ongin statur, eingin politisk skipan tíansheldur nakar politiskur flokkur, kann gera menniskja eyðnuríkt. Tað er bara menniskja sjálvt, ið kann skapa sína egnu lukku. Tó ikki sum einstaklingar, men saman við øðrum menniskjum við javnrættindunum sum grundarlagi."

Í innsiglingini til New York stendur frælsisguðinnan hjá Bartoldi, við reyðu, frygisku húgvuni. Rivin og skrødd, bróstini danda. Misbrúkt, neyðtikin og fjøtrað, men ongantíð kúgað. Syðrugøtupromenadan liggur líka órørd sum í mínum ungu døgum, og vónandi eiga føroyingar meiri enn eina spakalongd undir henni, tá ið vit aftur hittast her um eitt ár og sólin enn einaferð hevur lagt leiðina suðuryvir. Tíðirnar broytast, eisini her hjá okkum, so samfelagsrevsarin og kanski heimsins fremsti troubadørur, Bob Dylan, mundi ikki vera so heilt avmarsjeraður tá ið hann yrkti sangin The times they are a´changing.

Takk fyri at eg varð boðin higar ídag, og havi eina góða framtíð í sátt og semju og við áhaldandi framburði her í Gøtunum!

**Glyvrum, 24. Juni 2000.**
**Tórbjørn Jacobsen**



*Blíðir sløkkiliðsmenn, politistar og portørar bjóðaðu børnunum ein túr og at royna útgerðina*

gult cyan magenta svart